## Jólakonsert í Glyvra kirkju

KONSERT
*tíðindaskriv*

Sunnudagin 28. november hava Havnar Ungdomshornorkestur og Nes Sóknar Musikkfelag felags konsert í Glyvra kirkju. Leiðari hjá báðum orkestrunum er musikklærarin Ken Jones. Hetta er triðju ferð, at hesi bæði orkestur hava felags jólakonsert.

Havnar Ungdómshornorkestur er sett saman av sera ungum spælarum, sum tó ikki eru óroyndir. Tey hava m. a. verið bæði í Noregi, Aberdeen og París og spælt. Somuleiðis fyrireika tey eina ferð til í New York í summar, so sigast má, at hesir ungu blásarar fáa altjóða royndir.

Nes Sóknar Musikkfelag er sett saman av spælarum úr bygdunum kring Skálafjørðin og úr Oyndarfirði. Orkestrið hevur í ár fingið nýggj instrument og er mannað við umleið 30 spælarum, bæði ungum og eldri. Tey spæla regluliga til mong ymisk tiltøk: stevnur, hátíðarhald, konsertir og tendring av jólatrøum. NSM var í 1999 á konsertferð í Skotlandi og síðsta summar í Hetlandi.

Á konsertini verður byrjað við felagsorkestri, sum tá telur yvir 40 spælarar. Eftir felags byrjanina hevur NSM hesa skrá: Nú ringja klokkur, It's the Most Wonderful Time of the Year, Once in Royal Davids City, White Christmas, Jólaklokkan aftur ringir.

HUH spælir hesi løg: Angels We Have Heard, 2. satsur úr Trompetkonsert hjá Haydn (Tróndur Herason er solistur), Here Comes Santa Claus, Nu tändas tusen juleljus, Sleigh Ride. Ein messingkvintet úr HUH (Ken Jones, Pauli Petersen, Tróndur Herason, Glenn Samuelsen og Dávur J. Magnussen) fer harafturat at spæla Halleluja-kórið úr Messias hjá Händel.

Endað verður við, at felagsorkestrið spælir undir til felagssálmin Gleðilig jól.

# Nýggjur borgarstjóri í Hovi

**Tað verður Delmar Tausen, sum skal leiða hovbingar ígjøgnum tey næstu fýra árini**

BYGDARRÁÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hovbingar hava fingið nýggjan Borgarstjóra.

Á bygdaráðsfundi herfyri hevur nýggja bygdaráðið í Hovi skipað seg Delmari Tausen sum borgarstjóra. Varaborgarstjóri er enn sum áður, Jákup Petur Joensen.

Hinir bygdaráðslimirnir í Hovi eru Emma Petersen, Dagfríð Hovgaard og Jónsvein Hovgaard, sum er nývaldur.

Annars skal Delmar Tausen umboða kommununa í Føroya Kommunufelag, Jákup Petur Joensen skal umboða kommununa í SEV, Jónsvein Hovgaard skal umboða kommuna í IRF og Dagrfríð Hovgaard skal umboða kommununa í nevndini fyri Suðuroyar Ellis- og røktarheimi.

Tað var longu undan valinum greitt, at nýggjur borgarstjóri skuldi finnast í Hovi, tí borgarstjórin,



*Delmar Tausen verður borgarstjóri í Hovi tey næstu fýra árini*

Emma Petersen staðfesti rættiliga tíðliga, at hon fór ikki at taka av einum afturvali.

Delmar Tausen sigur, at høvuðsmálini hjá nýggja bygdarráðnum verður at gera kloakkkipanina í bygdini lidna og at fara í holt við vatnveitingina, eitt nú er sjálvur vatnbrunnurin farin at eldast.

# Hvalbingar samdust um Levi

**Fyri fyrstu ferð í langsamiliga tíð er bygdaráðið í Hvalba samt um, hvør skal verða borgarstjóra**

BYGDARÁÐSVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Levi Niclasen heldur fram sum borgarstjóri í Hvalba í fýra ár afturat.

Tað varð greitt eftir fund í nývalda bygdaráðnum í Hvalba mánakvøldið.

Á fundinum varð skotið upp at Levi Niclasen skuldi halda fram sum borgarstjóri og tað var einmælt samtykt.

Sostatt er tað fyrstu ferð í langsamiliga tíð, at bygdaráðið í Hvalba er samt um at velja borgarstjóra.

Men tað var ikki heilt av tilvild, at alt bygdaráðið samdust um borgarstjóra.

Frammanundan bygdaráðsfundinum, høvdu allir teir nývaldu bygdaráðslimirnir fund, har tey samdust um at skipa bygdaráðið í sátt og semju.

Annars fekk listi A, sum er listin hjá borgarstjóranum fýra, av teimum sjey bygdaráðslimunum og kundi sostatt skipa bygdaráðið einsamallur.

Men tað varð gjørt av at royna eina semju og tað eydnaðist. Sostatt fær eisini listi B sína ávirkan á kommunupolitikkin í Hvalba tey næstu fýra árini.

Eitt nú verður Magni Bertholdsen á lista B varaborgarstjóri tey næstu fýra árini.



*Hetta er listi A í bygdaráðnum í Hvalba. Fremst á myndini er Levi Niclasen, formaður, síðani Otto West, Bjarta Berg, sum er nývald og aftast, Niels Jacob Thomsen*



*Og Hetta eru so tey trý, ið manna lista B í bygdaráðnum í Hvalba. Frá vinstru eru teir Martin í Nesi og Magni Bertholdsen, sum báðir eru nývaldir, og Trygvi Midjord*

Annars hevur bygdaráðið í Hvalba gjørt av at skipa eina nevnd afturat og tað er ein vega- og havnanevnd. Soleiðis eru mál, sum viðvíkja vegum og Havnum tikin úr teknisku nevnd og løgd í eina serstaka vega- og havnanevnd.

Í fíggjarnevndini er Levi Niclasen formaður, í teknisku nevnd verður Trygvi Midjord á lista B, formaður, í trivnaðarnevndini er Otto West á lista A, formaður og í nýstovnaðu havnanevndini er Niels Jacob Thomsen á lista A, formaður.

### Asfalt og bátahylur

Tað, sum bygdaráðið í Hvalba fer at leggja dent á tey komandu árini, er at asfaltera vegirnir í kommununi lidnar, tí teir eru rættiliga illa farnir, serliga summastaðni í Hvalba.

Somuleiðis er ætlanin at gera ein nýggjan bátahyl innanfyri flakavirkið. Hann er mettur at kosta ímillum 3 og 4 milliónir.

Annars eru tveir bátahylar í Hvalba frammanundan, men Levi Niclasen sigur, at veruleikin er, at teir eru ikki nóg góðir og har fáa bátar ikki ligið um veturin.

# Bókadagur

Sunnudagin 28. november, sum eisini er fyrsti sunnudagur í atvent, verður ein sonevndur Bókadagur hildin í Norðurlandahúsinum. Møguleiki verður at hoyra brot úr ymsum nýggjum bókaútgávum upplisin, eins og kunning verður um nýútkomnar bøkur

Tiltakið byrjar kl 15.00 og verður ymsa staðni í Norðurlandahúsinum.

– Fyrst fara Jóanis Nielsen, Heðin M. Klein og Oddfríður M. Rasmussen at lesa upp yrkingar eftir Christian Matras í Klingruni.

– Síðani verða Tolkien og Tórgarð at hoyra. Hanus Kamban fer nevniliga at lesa upp úr bókini um Ringanna Harra.

So er sangur og tónleikur á skránni. Zacharis Sørensen fer at framføra løg úr lagasavninum til Føroya fólks Sangbók. Hetta verður eisini í Klingruni.

Eftir sangin fer Oddvør Johansen at lesa úr virðisløntu bók síni um Sebastians hús.

Allar hesar framførslurnar varða ímillum 10 og 15 min.

Í Forhøllini fer Arthur Krasilnikoff, sum er gestur úr Danmark, síðani at lesa upp úr bók síni, nevnd »Hvalens Øje«. Hann fer síðani eisini at tosa um bókina.

Í Dansistovuni verður høvi at hoyra Heðin M. Klein lesa upp yrkingar úr nýútkomna yrkingaavni sínum.

So verður aftur farið inn í Klingruna, har Marjun Kjelnæs lesur úr stuttsøgusavni sínum, »Ein farri av kolvetni«.

Bókadeild Føroya Lærarafelags fer síðani at kunna um nýútkomnar bøkur. Eisini her verður upplestur á skránni.

Carl Johan Jensen fer so at lesa úr nýggjasta yrkingasavninum hjá Tóroddi Poulsen.

Seinasta tiltakið á skránni verður orðaskifti við pallborði, sum fer at tosa um »ummæli og umstøður at ummæla í Føroyum«. Við pallborðið sita Bergur D. Hansen, Hanus Kamban, Kinna Poulsen og Carl Johan Jensen. Orðstýrari verður Ivan Niclassen.

Í Førhøllini fer bókasølan í SMS at selja nýútkomnar bøkur og Bókadeild Føroya Lærarafelags fer at sýna fram upprunamyndirnar í nøkrum av teimum myndabókum, sum forlagið gevur út í vetur.

**eys**



Kirkjan í Hoyvík:

# Skal standa í fleiri hundrað ár

**Leingi hevur verið tosað um at byggja eina kirkju í Hoyvíkshaganum. Fyri 20 árum síðani varð ein arkitektakapping útskrivað, men ikki fyrr enn nú verður av álvara farið undir arbeiðið. Hoyvíkingar gleða seg**

HOYVÍKAR KIRKJA
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*



Katrin Dahl er ein av teimum, sum hevur verið við í arbeiðnum við Hoyvíkar kirkju síðani byrjanina. Hon sigur, at hon veruliga gleðir seg til farið verður í gongd við arbeiðnum.

– Tað er heilt víst, at okkum tørvar eina kirkju her uppi. Um stutta tíð verða vit næststørsti býur í Føroyum, næst eftir Havnina, og tað ber ikki til, ikki at hava eina kirkju fyri okkum sjálvi, heldur Katrin.

### Drúgt arbeiði

– Fyri 20 árum síðani sóu vit, at býurin fór at vaksa. Tí fóru vit tá undir fyrireikandi arbeiði, til at fáa eina kirkju í Hoyvíkshagan, greiðir Katrin Dahl frá.

Tey útskrivaðu tá eina arkitektakapping um nýggju kirkjuna. Eini 14 uppskot komu inn, og uppskotið hjá Albert Isfeldt og hansara fólki vann tá 1. virðisløn.

– Vit ætlaðu tá at fara undir at byggja alt fyri eitt, men vit høvdu ikki serliga nógvan pening. Vit væntaðu tó, at feløg, fyritøkur og onnur fóru at vilja stuðlað kirkjuni, men tað vísti seg ikki at ganga. Tey vildu, at arbeiðið skuldi byrja, og so vildu tey hugsa um tað, tá tey sóu hvussu tað fór at verða, minnist Katrin.

Tey hildu tað tó verða nakað váðamikið at fara undir at byggja, uttan at vita, um peningaligur stuðul fór at koma. Tí varð ætlanin løgd á hyllina, og har lá hon í 20 ár.

Hesi 20 árini er tó ein ávís upphædd av gjaldinum, sum kirkjurnar í Havn fáa, blivin sett av til kirkjuna í Hoyvík, og nú verður mett, at tað er forsvarligt at fara í gongd við arbeiðið.

Eginognin er nú tveir triðjingar av kostnaðinum og lán verður tikið uppá tað, sum restar í.

### Sakna egna kirkju

Katrin greiðir frá, at hóast tey á sinnu roknaðu við, at Hoyvíkin fór at vaksa munandi, so høvdu tey aldrin droymt um, at hon fór at vaksa so nógv, sum hon hevur seinastu árini.

– Vit hava verið noydd at broyta upprunaliga uppskotið nakað, tí upprunaliga kirkjan hevði verið ov lítil til alt fólkið, sum nú býr í Hoyvík. Tí verður kirkjan eisini nakað dýrari enn upprunaliga ætlað, greiðir Katrin frá.

Hon heldur, at fólk í Hoyvík veruliga sakna ein kirkju sum er teirrra. Og tað verður tí eingin trupulleiki at fylla hana, hóast rákið í hinum norðurlondunum hevur verið, at kirkjurnar gerast alsamt tómari.

– Hatta ivamálið er ikki nakað, sum vit skulu taka við, frammanundan at kirkjan er bygd. Tí hyggur tú í kirkjurnar í Føroyum, so eru tað nógv fólk hvønn sunnudag. Eg ivist tí onga løtu í, at hoyvíksfólk eisini fara at taka sína kirkju til sín. Vit fara í øllum førum at gera alt, sum stendur í okkara magt, at fáa fólk at verða góð við hana. Og at halda negativa rákinum úr útlondunum burtur, staðfestir Katrin Dahl.

Hon leggur afturat, at undirtøkan og áhugin millum manna, bendir á alt annað enn eina kirkju, sum fer at standa tóm.

– Fólk gleða seg og tey eru óalmindiliga positiv, so eg beri ongan ótta fyri hasum, staðfestir hon.

Katrin sigur seg eisini vóna, at sambandið og samstarvið ímillum skúlan og kirkjuna fer at verða gott, eftirsum tey fara at verða síð um síð.

– Tey í skúlanum eru ógvuliga spent uppá kirkjuna. Og um vit fáa vant hoyvíksbørn við kirkjuna beinanvegin, heilt frá tí, at tey eru smá, so er møguleikin fyri, at tey veruliga taka hana til sín, ógvuliga stórur, sigur Katrin.

Hon heldur, at øll fólk mugu hava okkurt at hella sítt høvur á, og um tað ikki verður kirkjan, so verður tað okkurt annað. Allarhelst okkurt rák úr eysturheiminum, sum vísir seg vera so vælumtókt i grannalondunum.

### Funktionel og flott kirkja

Kirkjan fer at verða miðpunktið í Hoyvíkini, og hon fer at liggja við síðuna av skúlanum.

– Vit ætla at útbjóða longu í januar 2005. Vónandi verður spakin settur í um februar/mars, og ætlanin er, at kirkjan skal verða liðug á hvítusunnu í 07, sigur Katrin.

Í skipinum á nýggju kirkjuni fara 400 fólk at rúmast. Afturat tí, verður ein tilbygningur við dragihurðum, sum at kalla kann skoytast upp í skipið. Har rúmst 200 fólk. Hesin tilbygningurin kann so eisini nýtast til onnur ting, sum konfirmantfyrireiking ella sunnudagsskúla. Eisini verður eitt kjallararúm til at taka, og nýggja kirkjan fer eisini at hava eitt kapel.

– Hetta verður ein ótrúliga flott kirkja. Ljós verður í torninum, so tað fer at síggjast langvegis frá. Upprunaliga ætlanin er eisini at hava kopartak og laðað grót allanvegin framvið. Enn vita vit ikki um vit hava ráð at gera hetta beinanvegin, men ætlanin er so, at tað skal koma so líðandi, greiðir Katrin frá.

Tað eru tó nøkur ting, ið ikki eru tikin við í kostnaðin av kirkjuni. Tað eru urgan, kirkjuklokkan og kirkjusilvurið.

– Vit vóna, at vit fáa eina innsavnan í lag, soleiðis, at hoyvíksfólk sjálvi fáa møguleikan at lata kirkjuni hesi tingini. Ella í øllum førum at hjálpa til at fíggja tey, sigur Katrin.

Endalig avgerð er ikki tikin um altartalvuna enn, men Katrin veit at siga, at valið stendur ímillum tveir møguleikar.

– Tá vit á sinni fóru undir arbeiðið við kirkjuni, var Eivind Vilhelm, sáli og fyrrverandi bispur, ein av eldsálunum í arbeiðnum. Hann keypti einaferð ein kross, sum skuldi nýtast til altartalvu í Hoyvík. Krossurin stendur í dag úti á bispagarðinum, men spurningurin er, um ikki hann verður ov lítil, nú kirkjan verður størri enn ætlað. Hin altartalvan er ein málningur, sum Halstein Mikkelsen hevur málað og ognað Føroyum við tí treyt, at hann skuldi heingjast í eina kirkju. Higartil hevur hann hingið í Meinigheitshúsinum, men vit fara nokk at leggja eitt boð inn, so málningurin kann gerast okkara altartalva. Og vit finna nokk eisini pláss til krossin, um enn tað ikki verður sum altartalvu, sigur Katrin.

– Kirkjan skal vera ein virðiligur bygningur, sum allarhelst skal standa í fleiri hundrað ár. Og hon eigur at mynda byggilistina í tí tíðini, tá hon er bygd. Tað haldi eg, at Hoyvíkar kirkja fer at gera, staðfestir Katrin Dahl at enda og leggur afturat, – Nú mugu vit bara biðja til, at alt gongur sum tað skal, so vit sleppa í okkara egnu kirkju í 2007.



